# Stuðul frá NATA

NATA North Atlantic Tourism Association

## TIL FERÐAVINNUVERKÆTLANIR

Øll við áhuga fyri at fremja ferðavinnusamstarv millum Grønland, Ísland og Føroyar, kunnu søkja um stuðul til verkætlanir innan hesi øki:

- Marknaðarføring
- Nýskapan og vørumenning
- Kunningarferðir millum ferðavinnuvirki
- Góðsku- og umhvørvismenning innan ferðavinnu

Umsóknir skulu skrivast á serligt umsóknarblað og skulu vera antin á donskum ella á enskum máli.

Umsóknarblað og neyvari upplýsingar fáast á heimasíðu Uttanríkisráðsins www.mfa.fo ella við at skriva til mfa@mfa.fo
Freistin at lata inn umsókn er **týsdagin 15. mars 2011**.
Umsóknir skulu sendast til mfa@mfa.fo

## TIL KUNNINGAR- OG NÁMSFERÐIR

Møguleiki er nú aftur at søkja NATA um stuðul til kunningar- og námsferðir til Íslands og Grønlands.

Hesi kunnu søkja um stuðul:

- Skúlaflokkar
- Ítróttarfeløg
- Tónleikabólkar
- Onnur mentanarsamstørv

Umsóknir skulu skrivast á serligt umsóknarblað og skulu vera antin á donskum ella á enskum máli.

Umsóknarblað og neyvari i upplýsingar fáast á heimasíðu Uttanríkisráðsins www.mfa.fo ella við at skriva til mfa@mfa.fo
Freistin at lata inn umsókn er **týsdagin 15. mars 2011**.
Umsóknir skulu sendast til mfa@mfa.fo

NATA er samstarvsavtala millum ferðavinnuráðharrarnar í Grønlandi, Íslandi og Føroyum. Endamálið er at menna og økja samstarv innan ferðavinnu í hesum trimum londunum, har tey hava felags áhugamál. Eisini er endamálið at økja kunnleikan og skapa sambond millum ungdóm í hesum trimum londunum.

# Móttøka í Nærverkinum

**Fríggjadagin 4. mars 2011 verður móttøka í Nærverkinum á Smyrilsvegi 13, Tórshavn**

Nærverkið hevur savnað ein stóran part av virkseminum í Suðurstreymi á Smyrilsvegi 13 í Tórshavn. Tað snýr seg um Heimatænastan í Øki 1, Stuðulstænastan, Børn & Ung, Lønardeildin, Bókhaldið og KT-funktiónin.

At hesar deildir nú eru undir sama taki, fer at lætta um hjá viðskiftafólki okkara, og vit vilja fegin nýta hetta høvi til at bjóða til almenna móttøku

**Fríggjadagin 4. mars kl. 14-16.**

**Øll eru hjartaliga vælkomin**

NÆRVERKIÐ

www.naerverk.fo

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

# ÚTBJÓÐING

Hervið verður arbeiðið, at leggja nýtt graslíki á verandi vøll / stoytdoyvingarlag við Djúpumýru, boðið út í almennari lisitatión.

Graslíkið skal leggjast á í tíðarskeiðnum frá 28. juni til og við 23. juli 2011.

**Arbeiðið talan er um er:**

- Útlegging av uml. 245 m² av stoytdoyvingarlagi.
- Álegging av 7344 m² graslíki, FIFA ** góðska, íroknað sand og gummigranulat.

Tilboð, merkt "Fótbóltsvøllur í Klaksvík - Nýtt graslíki, tilboð" verður at lata inn til Klaksvíkar Kommunu í seinasta lagi týsdagin tann 15. mars 2011, kl. 14:00, og vera tey tá latin upp í hjáveru teirra bjóðandi, sum ynskja at verða til staðar.

Klaksvíkar Kommuna tilskilar sær rætt til frítt at velja ímillum øll innkomin boð ella at havna teimum øllum.

Útbjóðingartilfarið fæst við at venda sær til Klaksvíkar Kommunu, telefon 410 000.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA
N. Pálsgøta 32
FO-700 Klaksvík

www.klaksvik.fo

# Goymslufólk til MEST Tórshavn

**Hevur tú hug at arbeiða í einum spennandi umhvørvi á goymslu okkara í Havn?**

Vit selja alskyns útgerð til skip og virkir: mekaniskar vørur, stálvørur, hydraulikkvørur, el-vørur o.m.a. tilfar til vinnuna á sjógvi og landi. Sum goymslufólk verður tú partur av einum eldhugaðum goymslutoymi í tøttum samstarvi við goymslufólk okkara á Skála og í Runavík.

**Vit ynskja, at tú:** Ert áhugaður, sjálvstøðugur, røkin, ágrýtin og kundavinarligur.

Skrivlig umsókn við møguligum avriti av prógvum, royndum o.ø. skal sendast til:

**MEST Tórshavn**
**J.C. Svabosgøta 31**
**FO-110 Tórshavn**
Att.: Eirikur Joensen, goymsluleiðari

í seinasta lagi 15. mars 2011.

Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, kanst tú venda tær til Eirik Joensen á telefon 79 11 77 ella við telduposti til eirikur.joensen@mest.fo.




75 Skipasmíð og umvæling í 75 ár

MEST - ein álitandi samstarvspartnari